## Nýggjan bil

Bjargingarfelagið í syðru helvt í Suðuroy hevur fingið nýggjan bil til sítt virksemi. Bilurin, sum er seks ára gamal, er keyptur úr Klaksvík, har hann hevur verið sjúkrabilur. Í bilinum er millum annað útgerð til at klippa fólk úr bili í sambandi við ferðsluóhapp. Við keypinum sigur Suðuroyar syðra bjargingarfelag tríggjar bilar, ein Mitubishi, ein gamlan Volvo og so tann nýggja bussin, sum er av slagnum VW, skrivar Suðurrás.

## Nei til hvalaveiði

Danska deildin av altjóða djóraverndarfelagsskapinum World Society for the Protection of Animals og danski felagsskapurin Dyrenes Venner hava í felag stovnað heimasíðuna redhvaler.nu. Á heimasíðurin stendur stendur millum annað, at tað hevði verið ein vanlukka, um handilslig hvalaveiða verður loyvd aftur - ikki bara fyri hvalastovnarnar, men eisini fyri fólk, sum lutvíst liva av hvalaveiði so sum grønlendingar.

# – Javnstøða finst ikki í Føroyum



*Lena L. Mohr, blaðstjóri á Kvinnu, sigur, at tað vantar javnstøða í Føroyum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**So dýran tekur Lena L. Mohr, blaðstjóri á Kvinnu, til. Hon er ikki í iva um, at nógv umtalaða og útskeldaða kvinnudagshaldið hjá blaðnum er eitt hart tiltrongt tiltak at fáa bóltin á rull til at betra um karmarnar hjá føroysku kvinnuni í samfelagnum**

KVINNUDAGUR
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Blaðið Kvinna hevði ikki meira enn kunngjørt, at tey fóru at hava eina stóra kvinnuráðstevnu á kvinnudegnum, fyrr enn ramaskríggini byrjaðu. Tiltakið er alt ov dýrt, tiltakið er ikki fyri allar kvinnur, tiltakið hevur onki við upprunan hjá kvinnudegnum at gera, tiltakið brúkar almennan pening til kommersiel endamál. Ja, nógvar vóru atfinningarnar, men kvinnan aftanfyri tiltakið, Lena L. Mohr blaðstjóri á Kvinnu, tekur alt púrasta róligt. Heldur er hon glað fyri, at tiltakið hevur megnað at seta korini hjá føroyskum kvinnum í miðdepilin. Og hon er ikki í iva um, at hetta er rætt gongda leiðin.

– Vit vita øll, at tað finst ongin verulig javnstøða her í Føroyum, tí vit brúka bara helmingin av okkara tilfeingi. Menninir sita á øllum teimum týdningarmiklu størvunum. Eitt nú í landsins leiðslu, har vit hava nærum ongar kvinnur. Eitt nú eru vit sum samfelag líka ússalig á hesum øki, sum eitt so tilafturskomi land sum Afghanistan, so tað er hart tiltrongt at seta kvinnukorini á breddan, sigur Lena L. Mohr.

### Skal bert ein kvinna til

Hóast tað ikki er lætt at broyta kvinnukor, so vísur Lena á, at kvinnur kenna kvinnuna best, og at tað skal í veruleikanum bara ein kvinna til at broyta upp á støðuna.

– Tak eitt nú Ingeborg Winther. So skjótt sum hon kom upp í fakfelagspolitikk bleiv støðan broytt munandi til ta betra fyri konufólk. Hon syrgdi millum annað beinanvegin fyri, at tímaløntu kvinnurnar fingu sama sáttmála sum tímaløntu menninir. Hetta vísur, at tað krevur bara eina kvinnu til at betra um korini hjá øllum kvinnum, sigur Lena L. Mohr.

Í sama eygnabrái vísur hon aftur, at kvinnutiltakið hjá Kvinnu ikki er til allar kvinnur.

– Nei, hetta tiltakið er avgjørt til øll; eisini til menn. Tað eru jú ikki bara vit kvinnur, ið skulu fáa eina hugburðsbroyting á hesum øki. Tað skulu menninir so sanniliga eisini. Og tað er nakað tvætl, at hetta tiltakið er alt ov dýrt. Hetta er jú ein heildags ráðstevna, har vit hava fingið fatur í teimum allarbestu fyrilestrahaldarunum úr øllum Norðurlondum. Harafturat fara vit at borðreiða við leskiligum og lættum mat, drykkivørum og góðum undirhaldi. Atgongumerki kann ikki gerast bíligari, sigur Lena, og vísur á, at tað eru avgjørt ikki bara tey vælløntu í samfelagnum, ið longu hava ognað sær eitt atgongumerki.

### Siðvenjan gongur ímóti

Mangan hevur verið at hoyrt, at tað eru kvinnurnar sjálvar, ið hava feilin av, at tær ikki sita á ovastu rók, men her er Lena óeinig. Heldur vísur hon á, at orsøkin til, at kvinnurnar eru so langt aftanfyri, byrjar longu frá barnsbeini av.

– Í skúlum læra vit okkara børn, at tað eru menninir, ið eru sterkir. Tað eru menninir, ið duga alt, og tað eru menninir, ið avgera. Hvussu skulu so gentubørnini blíva tilvitaðar um, at tær saktans kunnu verða við eisini, spyr Lena L. Mohr undrandi.

Eisini vísur Lena á, at tað søguliga altíð hevur verið maðurin í Føroyum, ið hevur verið upphevjaður. Kvinnuna verður tosað minni um.

– Hvussu nógvir menn eru ikki nevndir í ymsum føroyskum verkum sum stórar krígshetjur, miklir bóndur og raskir fiskimenn? Hinuvegin hvør hevur skrivað um kvinnuna, ið tók sær av øllum sjey børnunum, tá ið maðurin fiskaði? Ella einkjuna, ið fekk húsarhaldið at mæla runt, hóast hon nærum onki átti?

Til at seta meira fokus á kvinnuna, hevur Kvinna fingið Elisabeth Møller Jensen frá KVINFO at halda ein fyrilestur um kvinnugransking á kvinnudegnum.

### Børn ongin forðing

Tað er ofta soleiðis, at kvinnur velja familjuna, og tískil tað minnilønta starvið fram um starvið í leiðsluni. Lena heldur, at tað skulu tær sjálvandi hava loyvi til. Hinuvegin heldur hon, at tað í dag eigur at verða møguligt hjá einari kvinnu at hava bæði børnini og leiðarastarvið.

– Samfelagið hjá okkum er soleiðis skrúva saman, at um tú hevur valt at fingið tær børn, so er tað ikki lætt hjá tær sum kvinnu at fáa leiðarastarvið at hanga saman við børnunum. Hetta eigur at verða møguligt, og hetta fara vit at seta sjóneykuna á á okkara kvinnudagshald, sigur Lena.

Til at seta meira fokus á arbeiðandi mammuna, hevur Kvinna fingið Benju Stig Fagerland, at halda fyrilestur. Benja Stig Fagerlund, ið eigur tvær døtur og harumframt er upp á vegin í áttanda mánað, veit, hvat hon prátar um, tí hon hevur meira enn trífaldað kvinnuumboðanina í nevndunum í norskum privatfyritøkum.

### Megnar kvinnudagshald

Hetta er fyrsta árið, at Kvinna heldur eitt kvinnudagshald, men hesi hald eru onki nýtt her í Føroyum. Hvørt árið hava ymsir kvinnufelagskapir skipa fyri tílíkum tiltøkum, og Lena heldur, at hóast hesi kvinnutiltøk eru avbera góð, so er tiltakið hjá Kvinnu ikki eitt vanligt kvinnudagshald, men ein stór ráðstevna.

– Teir ymsu kvinnufelagsskapirnir kring um Føroyar, hava gjøgnum ár og dag gjørt eitt frálíkt arbeiði fyri kvinnurørsluna. Okkara tiltak byggir bara víðari upp á, hvat hesar sterku grasrótunurnar hava bygt upp gjøgnum tíðirnar, sigur Lena Mohr.

Umframt Elisabeth Møller Jensen og Benju Stig Fagerlund, fer Eyðgunn Samuelsen frá Demokratia, Brynhild Thomsen journalistur, danski journalisturin Trine Gregorius og Lena sjálv at halda fyrilestur. Eisini fer Jóannes Eidesgaard løgmaður at seta ráðstevnuna, og Lena og Niclas fara at undirhalda við tónleiki.

## Heiðrikur á Heygum ger fløgu

**Heiðrikur á Heygum hevur serliga á myspace gjørt vart við seg seinastu árini við sínum sera egna tónleiki, bæði sum einstaklingur og í bólkinum High Hat**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nú er fyrsta fløgan hjá 23 ára gamla føroyska elektroniska tónasmiðinum og sangaranum á trappunum. Heiðrikur hevur lagt tónleik av fløguni á sína nýggju myspace síðu, www.myspace.com/heidrik, har ber til at hoyra 4 løg av fløguni An Invisible Gun, trý løg sum liggja í ljóðfílum og eitt sjónbandalag.

Talan er um elektroniskan tónleik, ið Heiðrikur sjálvur lýsur sum kompleksan, dansbaran og nýhugsandi.

Fløgan er framledd av elektronisku duoini High Hat, Brynjolfi av Heygum úr Side Effect og Heiðriki sjálvum.

At døma eftir løgunum er talan um, eitt tað mest gjøgnumførda verkið innan elektroniskan tónleik, síðan Maður:Glotti.

Teksturin dregur íblástur frá dagdreymunum hjá Heiðriki og hansara frusteratiónir í isolatión í Føroyum.

Christoffer Berg, ið m.a. er kendur sum ljóðblandari hjá The Knife, hevur ljóðblandað fløguna í Music-A-Matic upptøkuhølunum í Svøríki.

Á fløguni eru 11 sangir. Tað hevur ikki borið til hjá okkum, at fáa endaliga útgávudagin, men tað skilst at fløgan er til reiðar til útgávu. Inntil hon kemur út, ber til at uppliva tónleikin á myspace síðuni.